# Malan sópar alla mótstøðu til viks

**Tólv ára gamla Malan Michelsen av Tvøroyri hevur vunnið heili 17 danmarksmeistaraskap í svimjing. Stóra mál hennara er at sleppa at svimja á olympisku leikunum, sum verða í Grikkalandi um trý ár**

SVIMJIDROTNING
*Áki Bertholdsen*

Tá íð Malan Michelsen av Tvøroyri fyri níggju árum síðani flutti til Danmarkar at búgva, grunaði hon lítið um, at hon nøkur ár seinni skuldi blíva donsk svimjidrotning.

Men úrslitini talað fyri seg.

Hesi bæði seinastu árini hevur Malan tikið lut í kappingunum um danmarksmeistaraskapirnar í svimjing fyri hennara aldursbólk

Og hesar kappingarnar hava prógvað, at tólv ára gamla Malan Michelsen er so nógv besti svimjari í svimjari í sínum aldursbólki í Danmark nakrantíð.

Og hevur hon lív og heilsuna og annars ikki missir hugin at svimja, er hetta uttan iva eitt navn, vit fara at hoyra ofta í sambandi við svimjing tey komandu árini.

Malan var trý ára gomul, tá ið foreldur hennara Dánjal Jákup, og Fríbjørg Michelsen av Tvøroyri. gjørdu av at flyta til Danmarkar, og so fylgdi hon sjálvsagt við.

Vit fingu eitt orð á hana, nú hon er komin heim aftur í føðingardag hjá ommuni úr Vági, sum fyllir 85 ár seinni í mánaðinum.

### Á ovastu rók upp á trý ár

Úrslitini, sum Malan hevur rokkið í svimjing í Danmark, gerast av álvara undrunarverd, tá ið hugsað verður um, at tað eru ikki meiri enn trý og eitt hálvt ár síðani, at fór at svimja.

Hon svimur við Brøndby, sum er tætt við, har tey búgva í Keypmannahavn.

Men síðani hevur svimjingin verið hennara eitt og alt. Nú livur og doyr hon fyri svimjing og hevur ikki stundir til stórt annað, enn at svimja,siga tey, sum standa henni nær.

Men tað kann heldur ikki sigast annað, enn at tað hevur gingið upp á stás og hartil so nógv betri, enn nakar kundi væntað.

Malan hevur nevniliga víst seg at hava serstakliga góð evni at svimja og tað hevur gingið so skjótt framá, at hesi seinastu trý árini er hon komin heilt upp á ovastu rók í danskari svimjing.

Men tað krevur eisini sítt: Malan venur seks dagar um vikuna, tveir tímar hvørja ferð undir kønari leiðslu.

Men hendan miðvísa venjingin hevur eisini borið frukt. Seinastu tvey árini hevur hon verið í kappingini um Danmarksmeistaraskapin í svimjing fyri hennara aldursbólk, tvs, fyri børn, sum eru fødd í 1989 ella seinni.

Í einstaklingasvimjing hevur hon svomið í 11 ymsum greinum hvørt ár.

Í fjør steyk hon avstað við heili 10 gullmerkjum og einum silvurmerki. Í ár vann hon sjey gullmerki, trý silvurmerki, men í einari kapping varð hon kolldømd, tí hon rørdi ikki við kantin, einaferð, hon skuldi venda.

Við í kappingini vóru væl yvir 1.000 svimjarar úr øllum Danmark, so tað sigur eitt sindur um, hvørjum støði tvøragentan er á.

Men í ár svam hon harafturat eisini í trimum liðkappingum. Á liðnum var eisini eisini ein onnur føroysk genta, Helga Djurhuus úr Havn og tey vunnu eitt gullmerki, tvey silvurmerki og eitt bronsumerki í teimum fýra kappingunum.

So vítt, vit vita, er hetta tað mesta, sum nakar danskur svimjari nakrantíð hevur vunnið.

Tað er nevniliga ikki vanligt, at svimjarar eru so fjølbroyttir og javnt sterkir í øllum greinum, sum úrslitini vísa, at Malan er. Vanliga miðsavna svimjarar seg um nakrar heilt fáar svimjigreinar og - teinar, men at teir vinna í at øllum greinum, er heilt óvanligt.

Men sjálv viðgongur Malan, at hennara sterkastu greinar eru blandað svimjing og firvaldsvimjing

Sjálv ætlar hon ikki at spesialisera seg enn. Men tað verður hon helst noydd til seinni.

Malan er ikki heilt ókend í føroyskari svimjing. Í fjør var hon við í SUM (smáunglingameistaraskapurin) og tá vann hon níggju kappingar. Hon setti hartil níggju bólkamet av níggju møguligum.

### Royna at lokka

Hesi frálíku úrslitini hjá Maluni eru ikki farin afturvið borðinum í danska svimjiheiminum.

Feløg eru farin at leggja merki til føroysku svimjigentuna, men síðani gullið er farið at regna niðuryvir hana, er eyðvitað, at tað eru fleiri feløg, sum vilja hava hana til sín at svimja.

Fleiri feløg royna at lokka hana til sín, men enn er onki avgjørt, hvar hon fer at svimja. Feløgini kunnu ikki lokkað eina so unga gentu beinleiðis við pengum, men tað er ikki óvanligt, at tað verður gjørt óbeinleiðis, fyri at lokka evnaríkar svimjarar til, eitt nú við at bjóða teimum at sleppa undan at betala limagjald, ella at bjóða teimum at betala svimjiferðir uttanlands, ella við at geva teimum onkrar aðrar sømdir.

Eitt nú hevur venjarin hjá henni fingið starv í einum øðrum felag, men treytin er, at hann hevur Maluna við. Tað eru eisini onkur feløg sum ætla at byggja svmjilið upp rundanum hana.

Tað einasta, sum er greitt, er, at hon fer undir venjingarnar aftur fyrst í august, so er spurningurin, hvar tað verður.

Hon hevur heldur ikki gjørt av, hvønn svjimjitjóðskap, hon fer at fáa sær, so enn er ikki heilt, ósagt, at hon ikki verður at síggja á onkrum føroyskum svimjilandsliði.

### Ætlar sær við á Olympisku leikirnar

Tey, sum hava eygleitt Maluna, siga, at tað eru serliga tveir eginleikar hjá henni, sum tey leggja merki til.

Í fyrsta lagi er hon krútsterk, hóast hon enn ikki hevur havt styrkivenjing. Tað er hon ov ung til enn, men tað vervenjarin at leggja til rættis fyri hana seinni.

Í øðrum lagi er hon før fyri at miðsavna seg 100% um uppgávuna og hon er tískil ikki darvað av nervum, uttan tí sunna nervøsitetinum, sum skal til í einhvørjari kapping, fyri at fáa blóðið at renna skjótari so hon kann geva alt hon eigur.

Malan er eisini úttikin til danska landsliðið. Hon er einasti svimjari í hennara árgangi, sum er úttikin til danska landsliðið og hon er sostatt nógv yngsti svimjarin í á talentstøðini hjá danska svimjisambandinum, har framtíðarsvimjararnir verða vandir.

Og tað verður heldur ikki dult fyri, at Malan hevur sett sær mál sum svimjari. Stór mál, tey størstu, eitt ítróttarfólk kann hava. Hon hevur nevnilga sett sær sum mál, at svimja so væl, at hon kvalifiserar seg til olympisku leikirnar, sum verða í grikska høvuðsstaðnum, Athen, í 2004. Tá verður Malan 15 ár og hvør veit, kanska fáa vit tá á fyrsta sinni eitt føroyskt ítróttarfólk á sigursskammilin í ítróttarkappingini yvir øllum. Hvør veit. Livst so spyrst.



*Føroysk svimjidrotning í Danmark: Malan Michelsen av Tvøroyri er nógv besti svimjari í hennara aldursbólki í Danmark, nakrantíð. Hesi bæði seinastu árini hevur hon vunnið heili 17 gullmerki av 22 møguligum í einstaklingasvimjing í kappingunum um danmarksmeistaraskapin og so vítt, vit vita, kann ongin annar svimjari í Danmark vísa á so góð úrslit*

## Soleiðis svam Malan

**Hesi vóru úrslitini hjá Maluni Michelsen av Tvøroyri í kappingini um danmarksmeistaraskapin herfyri**

SVIMJIBRAGD
*Áki Bertholdsen*

Her hava vit úrslitini, sum Malan Michelsen av Tvøroyri fekk fekk í kappingini um danmarksmeistaraheitið í svimjing herfyri fyri børn, sum eru fødd í 1989, ella seinni.

Malan var við í 15 kappingum og hon vann heiðursmerki í teimum øllum - uttan í einari, men í henni varð hon varð kolldømd, tí at hon ikki rørdi við kantin, einaferð, hon vendi

| | Úrslit | Tíð | Besta tíð |
|---|---|---|---|
| **Einstaklingakappingar:** | | | |
| 50 m. frí: | Gull | 0.30,10 | 0.29,80 |
| 100 m. frí: | Gull | 1.05,80 | |
| 200 m. frí: | Silvur | 2.22,60 | |
| 100 m. rygg: | Gull | 1.14.50 | |
| 200 m. rygg: | Silvur | 2.41,30 | |
| 100 m. bringu: | Silvur | 1.20.70 | |
| 200 m. bringu: | Gull | 2.55,30 | |
| 100 m. firvald: | Gull | 1.12.40 | 1.11,81 |
| 100 m. blandað: | Gull | 1.13.80 | 1.13.30 |
| 200 m. blandað: | Gull | 2.40,30 | 2.36.50 |
| **Liðkappingar** | | | |
| 50 m. frí: | Bronsa | 0.29,88 | 0.29,80 |
| 50 m. rygg | Gull | 0.34,30 | |
| 50 m. bringu: | Silvur | 0.37,10 | |
| 50 m. firvald: | Silvur | 0.31,10 | |

Í kappingini í 400 metra frísvimjing varð Malan kolldømd tí at hon rørdi ikki við kantin, ta einu ferðina, hon skuldi venda.

Tilsamans vann Malan sostatt átta gullmerki, fimm silvurmerki og eitt bronsumerki, ella heili 14 heiðursmerki tilsaman.

Í einstaklingakappingum vann hon sjey gullmerki og trý silvurmerki og og í liðkappingunum vann hon eitt gullmerki, tvey silvurmerki og eitt bronskumerki.

Í fjør var Malan eisini við í hesi kappingin og tá vann hon eisini fleiri heiðursmerki. Hesi bæði seinastu árini, hevur Malan Michelsen sostatt vunnið 22 gullmerki í einstaklingakappingum í kappingunum um danmarksmeistaraskapin. Hetta framúr úrslitið ger hana til nógv besta danska svimjara í hesum aldrinum nakrantíð, tí hetta kann eingin annar danskur svimjari nakrantíð, erpa sær av.



18-ára gamal fuglfirðingur lat lív:

# Sovnaði helst meðan hann koyrdi



*Pílúrin á myndini vísir, hvar bilurin fór av vegnum, og tann 18-ára gamli doyði. Fyri nøkrum mánaðum síðani kravdi ein ferðsluvanlukka í Runavík trý mannalív. Hesuferð var tað í Leynum. Hvar verður tað næstu ferð?*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Aftur hetta vikuskiftið kravdi ein ferðsluvanlukka eitt ungt mannalív. Ein 18-ára gamal drongur fór útav í Leynum og endaði í áarósanum, har hann lat lív**

FERÐSLUVANLUKKA
*Stefan í Skorini*

Klokkan 07.17 leygarmorgunin fekk løgreglan í Havn fráboðan um eitt ferðsluóhapp í Leynum. Ein bilur var farin útav vegnum millum Stykkið og Leynar.

Vanlukkan fór fram umleið klokkan 4 leygarmorgunin, men eingin varnaðist tað fyrr enn tríggjar tímar seinni. Orsøkin er helst, at bilurin ikki sást av vegnum, tí hann var farin so langt omanav.

Førarin var ein 18-ára gamal drongur av Kambsdali, og hann var einsamallur í bilinum. Hann hevði verið í Vestmanna og var á veg innaftur í Eysturoynna, tá vanlukkan hendi.

Løgreglan heldur, at drongurin er deyður á staðnum, tí løstirnir frá stoytinum vóru so álvarsamir, at hann óivað hevur latið lív beinanvegin. Har er bratt omanav vegnum, og tí hevur stoyturin verið ógvuliga harður.

### Helst sovnaður

Løgreglan kann ikki siga við vissu, hvør orsøkin til óhappið er. Eftir øllum at døma hevur drongurin durvað í bilinum, og tí er hann farin útav. Hetta metir løgreglan, tí eingi spor eru at síggja á vegnum, har drongurin hevur koyrt. Tað er í øllum førum ikki nakað, ið bendir á aðra orsøk til vanlukkuna.

Bilurin hevur koyrt ígjøgnum eitt vendipláss, áðrenn hann er farin útav. Á hesum vendiplássinum er eingin bilverja, sum forðar bilum í at fara útav. Bilverja hevur verið á hesum vendiplássi, men hon er tikin burtur. Bilurin hevur tikið tveir stabbar, ið stóðu á vendiplássinum, við sær.

Landið er enn einaferð skelkað av ferðsluvanlukku, ið hevur tikið lívið hjá einum ungum manni. Slíkar vanlukkur henda oftast á náttartíð, tá tey ungu koyra í bili, og hetta er ein afturvendandi trupulleiki, ið tykist vera torførur at fáa bilbugt við.

# Kall og TeleF samdust

**Samráðingarnar í Íslandi millum Kall og TeleF bóru frukt, og nú verða fyritøkurnar báðar eftir øllum at døma lagdar saman.**

RÚNAR REISTRUP
*Samanlegging*

Samráðingarnar millum tær báðar størstu privatu farskiftisfyritøkurnar, Kall og TeleF, um at kasta saman, hava borið frukt. Mikudagin fóru umboð fyri eigararnar handan báðar fyritøkurnar til Íslands at samráðast um samanlegging, og um vikuskiftið ljóðaði, at ein avtala var komin í lag.

Eingin vildi í gjár siga nakað nærri um hvat avtalan inniber, tí fyritøkurnar vildu kunna sínar smærru partaeigararnar fyrst.

Nevndarformaðurin í Kalli, Jens Kári Vilhelm, váttaði, at ein avtala var fingin í lag millum Kall og TeleF, men hann vildi einki siga um hvat nú fer at henda.

Sosialurin skilir tó frá øðrum keldum, at TeleF eftir øllum at døma fer í søguna sum fjarskiftisfyritøka, meðan Kall heldur fram.

## Tikin við kenning á Eiði

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Leygardagin um nón fekk løgreglan í Runavík eina fráboðan av Eiði, um at ein maður var farin í bilin við kenning.

Løgreglan fór á staðið og steðgaði manninum. Hann varð tikin, og blóðroynd er tikin av honum fyri at staðfesta, hvussu nógv alkohol er í blóðinum.

Maðurin verður skuldsettur fyri at koyra við kenning, og kann vænta sær eina treytaleysa frádøming av koyrikortinum.

## Ferðsluóhapp á Núpinum

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Fríggjamorgunin varð ein ungur maður fluttur á Sjúkrahúsið á Tvøroyri. Hann hevði fingið skaða, tá hann rendi í ein stabba við Núpin á vegnum millum Lopra og Vág. Seinni varð hann fluttur á Landssjúkrahúsið við tyrluni.

Vegurin er ógvuliga smalur á hesum strekkinum, og arbeitt verður við at breiðka vegin. Bilurin hevur havt ov nógv ferð, og førarin hevur tí mist tamarhaldið á bilinum. Nógvur skervur liggur á vegnum, og tí er vegtakið ikki so gott.

Førarin hevur verið heppin, tí bilurin rendi fyrst á ein stabba og hekk síðani í bilverjuni. Um bilurin fór útav, so endaði hann í havinum, og førarin hevði neyvan sloppið við lívinum.

## Herverk í miðbýnum

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Løgreglan í Havn hevur aftur hetta vikuskiftið fingið fráboðan um herverk í miðbýnum. Kunningarstovan hevur staðið fyri skotum hesuferð. Tveir rútar eru farnir, og hetta hendi leygarnáttina.

Somu nátt hevur onkur eisini brotið tveir rútar í einum sethúsum í Magnus Heinasonargøtu.

Løgreglan fær slíkar fráboðanir hvørt vikuskiftið, og tað er torført at finna gerningsmenn, hóast fólk hava sæð onkran renna av staðnum.

Umframt herverk, so hava fleiri smávegis ferðsluóhapp verið í Havn. Talan er mest um parkeraðar bilar, ið eru árendir, har tann seki er rýmdur av staðnum.

Umboðsmaður væntar:

## Nógv skip at gera botnkanningar

SKIP
*Stefan í Skorini*

Johan Mortensen er umboðsmaður hjá skipinum Kommandor Jack, sum hevur verið í Føroyum og tikið royndir av botninum við boripallarnar. Nú er skipið í Føroyum í sambandi við eina heimsumfatandi veðurlagskanning.

Skipið hevur serútgerð at kanna botnin, og eftirspurningurin eftir slíkum skipum hevur verið stórur seinastu tíðina.

Jóhan Mortensen væntar, at nógv slík skip fara at koma hendavegin, nú borurin er settur í føroysku undirgrundina.

Felagið hjá Jóhan, Baldur, tekur sær m.a. av at umboða fremmand skip, tá tey koma til Føroyar.